# BØNARLØTAN

**DESEMBER** **2023** **38. árg.**

## *1. Fríggjadagur* *Kol. 1.1-14*



*Jóhannis við monnum úr bíbliubólkinum*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 13, Leah 10, Abigail 5**

Bíbliubólkurin hjá Jóhannisi veksur; teir eru nú fimm menn, sum møtast hvørja viku. Biðið fyri tí eina manninum, sum enn ikki er trúgvandi. Minnist tær ymisku tænasturnar, sum vit standa í. Okkum øllum tørvar eggjan og náði í arbeiðnum at stovna samkomur. Vit práta nógv við katolikkar, men fleiri teirra skilja ikki gleðiboðskapin. Biðið eisini, at Harrin signar og nøktar tørv okkara í komandi tíðum.

**KRINGVARPIÐ**
3. des. kl. 16 Sjónvarpsmøti, Ebenezer, Tórshavn
3. des. kl. 17 Útvarpsmøti, Betesda, Klaksvík

**EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21 Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21 Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Leygardagur* *Áp. 23.1-16*

**FØROYAR**
**Rutt og John í Skemmuni**
*Góð Tíðindi* nr. 3 varð í nov. sent við Posta til uml. 15.000 húski í landinum. Blaðið kann eisini lesast á evr.fo. Eg luttaki á møtum í Berøa vikuskiftið 1-3. des. Evnið er *Afturkoma Harrans*. Annars vitji eg samkomur kring landið og eri við til andaktir á sjúkrahúsi og ellisheimum í Suðuroynni. Takk, at tit biðja fyri okkum!



**Birgit og Svenning av Lofti**
**Atlantic Mission, Juvel II**
Vit skipa fyri evangeliseringsferð við Juvel II til Randers um páskirnar 2024. Biðið, at vit fáa manning, og at ungfólk tekna seg at koma við! Meir kunning hjá Ruth Gaardlykke, tel. 519090.

**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 15, Terji 11, Petra 9**

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 13**

**Anna og Hans Djurhuus**



2. des. verða vit við til føroyskt møti kl. 19 í Betaniakirkjuni í Aalborg, Dag Hammarskjøldsgade 2A. Tað gleðir okkum at síggja bæði ung og eldri koma til møtini har, og somuleiðis trúfasta skaran, ið savnast til vanligu møtini á Malta. Eisini koma fleiri børn frá danskari bakgrund í sunnudagsskúla. Biðið fyri møtunum í Aalborg, fyri samkomuni á Malta og nýggju fyristøðufólkunum.

## *3. Sunnudagur* — *Kol. 1.15-29*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

Pætur Midjord hevur verið umborð á Logos Hope nakrar mánaðir sum maskinmaður. Betty og Eirikur Lauritsen og Victoria, dóttir teirra, fara umborð í 6 vikur frá fyrst í des. Biðið fyri teimum. Fylgið við á sosialu miðlum okkara. Í des. varpa vit ljós á fýra trúboðarafamiljur, ið eru sendar út frá OM Føroyum.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**



Nakkaskurðviðgerðin hjá Daniel er sett til fyrst í des., har ein metallpláta skal takast. Helst ganga 6-12 mán., inntil hann kemur fyri seg aftur. Biðið, at hetta skal gangast væl. Minnist tey í Qasigiannguit, at Harrans ljós skínur í teirra hjørtum, nú veturin er myrkastur.

**ZAREPTA**

## 4. Mánadagur — *Áp. 23. 17-35*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Fyrsta mánadag í mánaðinum er *Mandagscafé* kl. 15.00 í Glostrup Frikirke, Østervej 12, Glostrup. Kaféin er væl vitjað, men rúm er tó fyri fleiri.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 14, Ester 13, Samuel 9**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 14, Kristina 12**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 9, Lukas 3**

## 5. Týsdagur — *Kol. 2. 1-23*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**



Her í Calvary Church er serliga nógv á skránni í des. Minnist okkum, sum vit fyrireika tey ymisku tiltøkini, at alt, sum er á skránni, vísir á Harran Jesus og Hann krossfestan. Á skránni eru m.a. konsertir, tiltøk fyri menningartarnað og familjur teirra, eitt altjóða tiltak og trý møtir jólaaftan.

## 6. Mikudagur — *Áp. 24. 1-27*

**Susan og Øssur Berghamar**

Vit gleðast um tey mongu ungu, ið vit regluliga síggja á møtunum í Kristnastovu. Hesa ársins tíð hugsa vit eisini um tey eldru, ið vit gjøgnum árini eru komin í samband við. Seniorsamkoma í

Kristnastovu verður mikud. 6. des. kl. 12.30. Vit takka hjartaliga fyri samfelag og forbøn.

## *7. Hósdagur* *Kol. 3.1-4.1*

### SENEGAL, Tongia
### Lív Poulsen



Kanningin av 1. Mós. og fyrstu 6 kapitlunum í Dán. gekk sera væl. Biðið, at tað verður møguligt at prenta í des. Mítt samleikakort skal endurnýggjast hendan mánaðin, og má eg tí til Dakar. Hesir longu koyritúrarnir eru møðsamir.

*Í dag fyllir Anna Emilia av Rana 9 ár

## *8. Fríggjadagur* *Áp. 25. 1-27*

### DANMARK, Kristnastova
### Sólva og Jákup Hansen

Møtini í Kristnastovu í des.: Seinasta fríggjakvøldssamkoman fyri jól er 8. des. Møtini sunnud. kl. 11 halda fram sum vanligt uttan jólaaftan, tá einki møti er. Jólasamkoma við ábiti og hugna verður 2. jólad. kl. 14.

## *9. Leygardagur* *Kol. 4. 2-18*

### FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa
### Cathy og Jógvan J. Rasmussen



Cathy og eg eru í Filipsoyggjum fram til 17. des. Eg arbeiði við tveimum umsetarum; einum á oynni Mindanao og einum á oynni Luzon.

## *10. Sunnudagur* *Áp. 26. 1-18*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 3, Selah Rose 0**

10. des. fara vit í farloyvi til USA. Biðið fyri ferðini, um vísdóm at leggja farloyvið til rættis og at Gud vísir okkum, í hvørjum ættarbólki vit skulu tæna. Vit eru takksom fyri at hava ferðaseðlar til Føroya í mars.



**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 12, Tabita 9, Debora 8, Natan 5**

## *11. Mánadagur* *3. Jóh. 1-15*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Vit takka Harranum fyri leiðslu. Ein partur av Jóh. ev. er nú klárur at brúka. Takk fyri allan stuðul og bønir tykkara.

## *12. Týsdagur* *Áp. 26. 19-32*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Augustin, Hillebrand og Aliyu eru í holt við seinastu partarnar av 1. og 2. Mós. og Nýggja Testamenti á saafimáli, áðrenn farið verður undir uppseting og prent. Biðið, at Gud leiðir. Vit takka okkara trúfasta Gudi fyri at hava tikið sær av okkara tørvi í 48 ár, og at Anna hevur megnað at liva við parkinsonsjúkuni í 24 ár.

*Í dag fyllir Noah Kristian Joensen 10 ár

## *13. Mikudagur* *2. Kor. 8. 1-24*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**



Bundin er bátleysur maður. Hetta er so satt í Grønlandi. Juvel stendur nú í Kollafirði eftir at hava siglt góð 20 ár síðan seinastu umvæling. Ætlandi skal hann yvir aftur í mai mánað næsta ár. Tørvur er á einum liði at slípa glastrevjaskrokkin, bøta um sár og gera klárt til sproytulakkering. Eisini skal ein røð av smáum ábótum gerast. Áhugað kunnu seta seg í samband við nevndina, Jóanes Norðberg, tel. 222909, Marna Berg, 228888, Gordon Martin Midjord, 595900, Marius Sørensen, 580816, og Páll Poulsen, 215181.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. Hósdagur* *Áp. 27. 1-20*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**



24. og 25. nov. var vikuskiftislega fyri sunnudagsskúlabørn, har 7-8 børn 1-13 ár og 3-5 ung 17-20 ár luttóku. Minnist tey í bønum tykkara.

## 15. Fríggjadagur — 2. Kor. 9. 1-15



**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

15. og 16. des. skipa vit aftur fyri møtum í Athen. Serliga hava nógv afgansk flóttafólk luttikið á møtunum. Vitjandi úr Eysturríki hava gjørt pakkar til børnini. Takk fyri forbønir tykkara í ár.

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 11, Emma 7**

Biðið, at Gud nemur hjørtu ígjøgnum tey ymsu tiltøkini í des. Jólakonsert verður 15. des., serligt jólamøti tann 17., og jólaaftan halda vit jól í samkomuni saman við støkum og einligum.

**FØROYAR**

**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



*Í dag fyllir Louie Mortensen 10 ár

## 16. Leygardagur — Áp. 27. 21-44

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 17, Rebekah 15, Lydia 13**

Biðið, at alt gongst væl við prenting og útbering av *Personal Support Matters*, og at tilfarið er nyttuligt hjá teimum, ið arbeiða

við trúboðan. Claire er við til at samskipa undirvísingartilfar til *Mission Partner Network Forum* í apríl 2024. Vón okkara er, at trúgvandi í Birmingham nýta møguleikan nú á jólum at boða evangeliið í býi okkara.

## *17. Sunnudagur* *2. Kor. 10. 1-18*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 17, Lydia 6**
Dóttir okkara Hannah tekur saman við Saru lut í ungdómsarbeiði, ið røkkur út til tey ungu millum 13 og 20 ár. Biðið, at tey ungu fáa gott samfelag hvørt við annað og vaksa í trúnni og kærleika til Jesus.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Mánadagur* *Áp. 28. 1-15*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**



Vit verða ikki heima á jólum í ár. Tann 18. des. flúgva vit til Manila í Filipsoyggjum. Frá 26. til og við 30. des. tali eg á stevnu í býnum Baguio fyri um 100 filipinskum trúboðarum. Vit fara heim aftur 17. jan.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 10, Micah 10**

## *19. Týsdagur* *2. Kor. 11. 1-15*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 14, Nana 12, Louie 10, Rio 4**
Vit halda fram at undirvísa børnum í enskum. Ætlanin er at hava jólaveitslu fyri børnum og foreldrum. Tey eru ikki øll kristin, so biðið, at tey skilja, hvør Jesus er.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**



*Í dag fyllir Leah Mortensen 10 ár

## *20. Mikudagur* *Áp. 28. 16-31*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 6, Timon 4**
Viðgongutíðin hjá Natalie við tvíburunum hevur higartil verið góð, og flogferðin til Týsklands gekk væl. Vit hava góða íbúð, og Louis er í góðum skúla, har hann gongur í 1. fl. Takk fyri forbønir. Biðið áhaldandi fyri Natalie, og at vit brúka tíðina væl at læra kovolmálið.

## *21. Hósdagur* *2. Kor. 11. 16-33*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Umsetingararbeiðið heldur fram. Biðið um vísdóm at týða rætt.

Vit takka Gudi, at viðgerðin hjá Sue gongur væl og hevur fá hjáárin. Læknin metir, at hon sleppur aftur til Meksiko í jan. Biðið, at viðgerðin í des. og jan. vinnur á møguligum krabbakyknum. Gud signi tykkum hesi jólini eins og í 2024.



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 17, Emma Grace 15, Jónatan 14,**
**Markus 11, Evita 8, Joy 6**

*Í dag fyllir Benjamin av Rana 15 ár

## *22. Fríggjadagur* — *Lukas 13. 1-17*

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Vit hava vitjað nøkur fólk í nov. á Fyn. Biðið, at vit áhaldandi hava samband við tey.

**ONGLAND, Taunton, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**



**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 12**

*Í dag fyllir Zephaniah Hansen 3 ár

## *23. Leygardagur* — *2. Kor. 12. 1-12*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Børnini á summarlegunum læra eitt evangeliskt vers hvønn dag í bíbliutímanum. Ofta minnast tey versini, tá tey koma aftur summarið eftir. Biðið, at Orð Guds ber ávøkst.

## *24. Jólaaftan* — *Es. 9. 1-21*

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 7, Jude 5, Evelyn 3, Olivia 0**

Vit skulu finna ein ættarbólk at tæna í. Møguleikarnir eru fleiri, og vit skulu eisini finna eina familju at samstarva við. Tað er torført og avbjóðandi at velja. Biðið, at Harrin leiðir og gevur okkum vísdóm at velja rætt.



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 15, Noah 14, Karis 10, Judah 8, Ethan 6**

## *25. Jóladagur* — *Matt. 2. 1-23*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 0**



Alt gekk væl, tá dóttir okkara Hanna varð fødd 12. sept. Hon er ein sonn gleði. Tað var gleðiligt, at foreldrini hjá okkum báðum komu at vitja. Jóladag hava vit árligu jólamáltíðina fyri teimum í Mamelodi, ið stríðast við rúsevnir. Takk fyri allan stuðul og forbønir fyri okkum og tænastuni hetta farna árið.

## *26. 2. jóladagur* *2. Kor. 13. 1-13*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 14**



Her hevur verið friðarligt seinastu tríggjar mán., og nú er bert 2½ mánaður, til valið verður. Biðið, at tað fer friðarliga fram. Arbeiðið at skifta bókhaldsskipan gekk væl. Takk fyri forbønir, og vit takka Harranum fyri tykkum øll, ið standa saman við okkum í verkinum her.

## *27. Mikudagur* *Lukas 13. 18-35*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**



Torført er at venja seg við Føroyar aftur eftir heimkomuna úr Pakistan! Vit arbeiða í løtuni upp á STEVN og halda fram við arbeiðnum í Pakistan. Vit fyrireika næsta stigið at fara yvir aftur. Bið Harran vegleiða og geva okkum vísdóm.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Hósdagur* *Sálm. 116 og 117*

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 15**

Tim hevur bíbliutímar fyri indonesum, meðan hann er í Føroyum, og fleiri vísa áhuga. Flestu indonesar vita lítið og einki um

kristindómin. Biðið, at Harrin opinberar sítt orð fyri teimum, soleiðis at teir taka ímóti gleðiboðskapinum.

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**

## *29. Fríggjadagur* — *Lukas 14.1-15*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 11, Noah Kristian 10**



Vit eru takksom fyri áhaldandi bønir tykkara, nú Eli lagar seg til broyttar umstøður í Hollandi. *The Well International* tørvar enn fleiri starvsfólk, og okkum tørvar vísdóm at hjálpa trúboðarum úti á markini.

## *30. Leygardagur* — *Lukas 14. 16-35*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**



Minnist næmingarnar her á skúlanum, sum tey halda fram við lestrinum, og okkum, sum undirvísa. Flestu fara heim til familju á jólum. Ætlanin er at fara ein túr til PNG í jan. 2024 at vitja samkomuna og rættlesa Nýggja Testamentið við teimum trúgvandi.




Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)

Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.

Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057

Uppseting Grafikmaster, tel. 502022

Myndasavn info@grafikmaster.fo

Prent Føroyaprent, tel. 314555

Teldupostur prayerservicefo@gmail.com

Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## 31. Nýggjársaftan — Sálm. 118

**BÓKATÆNASTAN**

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

**NÝGGJ BÓK!**
**32 síður    50 kr.**

Hetta er ein pakki við bæði jólakalendara og andaktsbók, sum hjálpir børnum og familjum at lesa saman í Bíbliuni. Aftan fyri hvørja lúku í jólakalendaranum er eitt vers úr evangeliunum Matteus og Lukas umframt ein vøkur mynd úr bókini *Stóra jólalyftið*. Hvønn dag í desember er ein stutt andakt, sum vísir, hvussu allarfyrstu jólini vórðu hildin, og hvussu Gud heldur sítt undurfulla jólalyfti.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo

# GOTT NÝGGJÁR!

*Náði og friður falli tykkum margfalt í lut!*

*1. Pæt. 1:2*